# Lærarar til Miðnám í Vestmanna

Miðnám í Vestmanna søkir lærarar at byrja á skúlanum 1. august 2019 í hesum lærugreinum:

**Alisfrøði C- og B-stig (3+5 t/v), enskum B- og A-stig (7,5+5 t/v), evnafrøði B-stig (7,5 t/v), ítrótti og heilsu C-stig (3 t/v), lívfrøði B- og A-stig (7,5+5 t/v), fyriskipan C-stig (3 t/v), samfelagsfrøði C-stig (3 t/v), samskiftistøkni C-stig (3 t/v) støddfrøði B- og A-stig (10+5 t/v), søgu C-stig (3 t/v), tilfeingisfrøði B-stig (12,5 t/v) og tilfeingi A-stig (10 t/v).**

Alt eftir lærugreinasamanseting kann talan verða um tímalærarar, kvotasett ella møguliga fast starv.

**Útbúgving og royndir**
Lærarar skulu hava kandidat- ella masterútbúgving av lærdum háskúla á 300 ECTS ella aðra samsvarandi útbúgving. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava undirvísingarroyndir og royndir at arbeiða við verkætlanum í skúlahøpi. Námsfrøðilig útbúgving er ein fyrimunur, men onki krav. Umsøkjarar, ið verða settir, og ikki hava námsfrøðiliga útbúgving, skulu í august mánaða taka námsfrøðiligt innleiðsluskeið, sum Mentamálaráðið skipar fyri.

**Arbeiðsuppgávur og førleikar**
Lærarar skulu, umframt at undirvísa, leggja undirvísing til rættis, luttaka í toymisarbeiði og vera við í ráðlegging skúlans. Í tilfeingislærugreinum leggja vit stóran dent á breiða fakliga vitan innan náttúrutilfeingi umframt hug og hegni at menna arbeiðið við næmingaverkætlanum, serliga í tilfeingi A. Eisini leggja vit dent á, at lærarar hava førleikar at gagnnýta tær frálíku umstøðurnar á skúlanum at arbeiða við verkætlanum og til royndararbeiði. Lærarar skulu sjálvsagt trívast saman við ungdómi og hava ein positivan hugburð til at menna skúlan sum heild. Góðir KT-førleikar og málsligir førleikar eru eisini dygdir, sum vit seta prís uppá.

**Setanar- og lønartreytir**
Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Miðnám og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Umsóknir skulu stílast og sendast til Miðnám í Vestmanna, Fjarðarvegur 4, 350 Vestmanna ella sendast til teldupostbústaðin: miv@miv.fo. Umsóknir við prógvum og CV skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mikudagin 3. apríl kl. 12.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup Andreasen, skúlastjóra, á tlf. 221 654, miv@miv.fo ella á heimasíðuni www.miv.fo


**Miðnám í Vestmanna**
Fjarðarvegur 4
350 Vestmanna
www.miv.fo


---

Tilfeingsbreytin á Miðnámi í Vestmanna er einasta av sínum slagi í landinum og varð sett á stovn í nýggju gymnasialu skipanini frá 2013. Á skúlanum ganga í løtuni umleið 50 næmingar. Trý fólk eru í føstum starvi, meðan onnur eru kvotasett og tímalærarar.